Toll- og Skattstova Føroya

# Avloysarastarv

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskatta-lógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at plan-legging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Stovnurin er farin undir bygnaðarbroytingar. Samstarvið millum økisskrivstovurnar og leiðsluna í stýrinum skal mennast, og stovnurin skal veita borgarum og virkjum eina betri tænastu. Tær núverandi seks økisskrivstovurnar verða lagdar saman til tríggjar.

Í Streymoyar øki starvast 60 fólk. Høvuðsskrivstovan, har viðkomandi koma at starvast, er á Smyrils-vegi, Posttolldeildin heldur til á Óðinshædd og Tollbúðin er á Eystaru Bryggju.

Heimasíða
www.tollskatt.fo

E-mail
streymoy@tollskatt.fo

Søkt verður eftir avloysara vegna barnsburðarfarloyvi til Eftirlits- og innheintingardeildina í Streymoyar øki at byrja 1. november 2005 til 15. mai 2006.

**Høvuðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um vanligt fyrifallandi skrivstovuarbeiði á deildini, innan meirvirðisgjald, skatt og toll.

Harumframt skulu loysast avgreiðsluuppgávur, sum fyrispurningar frá viðskiftafólki/vinnuni innan skatt- og avgjaldsøkið hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

Viðkomandi, ið settur verður í starv, skal kunna tola at broytingar verða framdar í innihaldi í starvinum, vegna broytingar á stovninum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu í minsta lagi hava roknskaparligan førleika og minst hava HH prógv ella líknandi.

Rætti viðkomandi er ein persónur, sum bæði er sjálvstøðugur, arbeiðssamur, fyrikomandi og dugir at samstarva.

**Vit kunna bjóða**
Spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis er fakliga krevjandi. Eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi fakfelag.

Núverandi setanarøkið er Streymoyar øki, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, og tann persónur, ið verður settur, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Nærri frágreiðing um starvið fæst við at venda sær til Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, Jens N. Dam, deildarleiðara, tlf. 30 84 00.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum v.m. og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

**5. oktober 2005**

**Toll- og Skattstova Føroya,**
**Streymoyar øki**
Postsmoga 3139
110 Tórshavn

Toll- og Skattstova Føroya

# Málsviðgeri

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðrnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at plan-legging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Stovnurin er farin undir bygnaðarbroytingar. Samstarvið millum økisskrivstovurnar og leiðsluna í stýrinum skal mennast, og stovnurin skal veita borgarum og virkjum eina betri tænastu. Tær núverandi seks økisskrivstovurnar verða lagdar saman til tríggjar.

Á Eysturoyar Øki, har viðkomandi kemur at starvast, eru 20 starvsfólk.

Lýsingin finst eisini á heimasíðu okkara: www.tollskatt.fo

E-mail:
eysturoy@tollskatt.fo

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki, er starv leyst at søkja til setan frá 01. November 2005.

**Høvuðsuppgávur**
Málsviðgerð av persónlíkning, stuðulskipanum, mvg, toll og annars vanligt skrivstovuarbeiði, so sum avgreiðsluuppgávur og fyrispurningar frá viðskiftafólki.

Viðkomandi, ið settur verður, skal kunna tola at broytingar verða framdar í innihaldi í starvinum, vegna broytingar á stovninum.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal helst í minsta lagi hava HH-útbúgving.

Rætti viðkomandi skal vera sjálvstøðugur, arbeiðssamur, fyrikomandi og duga at samstarva.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving.

Talan er um sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Núverandi setanarøkið er Eysturoyar Øki, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Nærri frágreiðing um starvið fæst við at venda sær til Ingolf Lamhauge, økisstjóra á tlf. 44 85 88.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum v.m. og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki, í hendi í seinasta lagi:

**10. oktober 2005**

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Eysturoyar Øki**
Postsmoga 225
FO-600 Saltangará

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

LEIGA
AMBOÐ
&
MASKINUR
Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00